# TILTØK

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í morgin kl. 17 Bøn fyri býnum og Ísrael, kl. 19 Delli.
Fríggjadagin kl. 20 Ungdómsmøti v/ Johan Petur Johannesen, evnið er »Krossurin«.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jaocbsen kl. 11.50 Sunnudagsskúli og ABC – Evnið: »Hjúnabandið« 1. partur, kl. 18 Sjónvarpsmøti – felagsmøti við Evangeliihúsinum.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067.
www.filadelfia.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Torsten Jortzick prestur, í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15-18.
Serliga vilja vit biðja fyri okkara meiniheit og tí henni tørvar.
Heimasíða www.katolsk.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Mánadag kl. 17 og 19 Skótamøtir.
Týsdag hornvenjing kl. 20.00.
Mikudag bønarmøti kl. 15.00. Mennirnir samlast kl. 19.30.
Hósdag Heimaforbundið kl. 20.00.
Fríggjadag samlast tey ungu hjá Siv og Eyfinn.
Sunnudag møti kl. 11, familjutími kl. 17.

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Týskvøldið kl. 20 Møti.
www.livdin.fo

**Meinigheitshúsið**
**Missiónsvika er hesa vikuna:**
Mánadagin kl. 20 Møti v/ Regin Høgnesen, Kristiliga Sangkórið syngur.
Týsdagin kl. 20 Møti v/ Jóannis Fonsdal, Thaborkórið í Fuglafirði syngur.
Mikudagin kl. 20 Møti v/ Hera Eltør, Meinigheitskórið syngur.
Hósdagin kl. 20 Møti v/ Reimund Langgaard, Akapella, gentur í Meinigheitshúsinum syngja. Ung av Strondum hava drama.
Fríggjadagin kl. 20 Møti v/ Hera Elttør, KFUM-kórið í Klaksvík syngur.
Leygardagin kl. 20 Møti v/ Hera Eltør, Gratia syngur.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, Gentukórið syngur, kl. 18 Møti v/ Hera Eltør, Manskórið syngur.

**Hebron, Argir**
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími og bønarløta. Páll Poulsen talar um 13. kap. í Opinberingini.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 13 Sunnudagsskúli og kl. 12 verður eisini møti, har Gunnar Nielsen talar. www.hebron.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.
Týsdagin kl. 19.30 Í KFUM: Kristiliga sangkórið venur. Nýggir sangarar eru vælkomnir við.

**Missiónshúsið Libanon (Sjómanskvinnuringurin)**
Hugnaløta verður hóskvøldið kl. 20. Burturluting.

**Saron, Vestmanna**
Týskvøldið kl. 20 Bønarmøti hjá Annu og Oddmar Hansen.

**Saron, Haldórsvík**
Mikukvøldið kl. 20 verður bíbliuundirvísing og bøn við David Bech, hjá Elianu og Magnus Olsen. Verið hjartaliga vælkomin.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30, Klæmint Eliasen talar. Evnið: Eldsjógvurin.
Opinberingin 20: 11-15.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tabor, Toftir**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman týskvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar. Innsavnan til sjómansmissiónina. Árliga festin verður lýst seinni.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 15 »Jesus Vinir« barnamøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Fríur vitnisburður.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími, Áps. 25. kap.
Hóskvøldið kl. 20 kemur Sjómanskvinnuringurin saman. Hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin í Vági**
Týsdagin kl. 20 Heimaforbundið.
Hósdagin kl. 20 Streingjakórið øvar.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti. Streingjakórið syngur. Malan Hentze talar. Øll eru vælkomin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 24. januar*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Kortspæl, telving, landastrok og onnur spøl.
Tilm. til døgurðan mikud. og fríggjadag tlf. 316491
**Vetrarkappingin í boccia verður í Vestmanna**
**29. januar kl. 10.00-14.30. Tilm. 316491**
*Týsdagin 25. januar*
kl. 10.-11.30 Sangur, Eyðun Sørensen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Ein roynd at lýsa hvussu bindiklubbarnir hava ment seg í Føroyum. Annika Skaalum
*Mikudagin 26. januar*
kl. 10.00–13.00: Matgerð. Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði. Høvi er at koma sum gestur. Tilm. tlf. 316491
kl. 15-17 Opið hús
*Hósdagin 27. januar*
kl. 10.00–10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11-11.45 Eingilsk talumál, Ásmundur Johannesen
kl. 14.00–17.00: Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum
*Fríggjadagin 28. januar*
kl. 10.00–13.00: Matgerð, Anne Grethe Harlou.
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur. Tilm. mánadag tlf. 316491
kl. 13-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Dagtilhaldið Fløvi**
– í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
*Mánadagin 24. januar*
Fimleikur v/ Jóhannu Troest
*Týsdagin 25. januar*
Boccia
*Mikudagin 26. januar*
Helen og Eyðun Joensen siga frá og vísa myndir úr Tailandi
*Hósdagin 27. januar*
Myndaveving fyri áhugað v/ Rannvu Gøte
*Fríggjadagin 28. januar*
Opið Hús

*Hvønn dag ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Eldrafelagið Kumlá á Skála**
hevur hugnaløtu í húsum felagsins í kvøld kl. 19. Øll eru vælkomin. Nýggir limir kunnu tekna seg.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl. 14 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Bløðini eru eisini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Mánadagin 24. januar*
Vit syngja, práta og hugna okkum.
*Mikudagin 26. januar*
Mogens Nielsen, undirvísari í talvi, kemur at læra okkum. Møtið fjølment.

**Hugnaløta – Eldrafelagið Nón, Saltangará**
Hugnaløta verður í Felagshúsinum týskvøldið kl. 19.30.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Malta, Hirtshals**
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

**Ørkin, Reykjavík**
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30. Aftaná er kaffi.

**Evangeliska Røddin, Odense**
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Eliaskirkjan.**
Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19 í kjallaranum í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 8 min. at ganga frá Hovedbanegården, 4 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1A, 6A, 14, 15 og 28 steðga nærhendis.
Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32 969995 ella Albin Johannessen, tlf. 32 88 68 79.
E-mail: pr@eliaskirkjan.dk
www.eliaskirkjan.dk

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll oman fyri 60 ár eru vælkomin.
Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**AA-fundir í Havn**
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.00 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00 Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Al-Anon**
Fundir fyri avvarðandi at alkoholikarum er mánakvøld kl. 21.00 á Glyvrum. Í gomlu lærara íbúðini í Glyvra skúla.

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Fyribyrgingarráðið**
*Argjaboðagøta 7 · 160 Argir*
*postrúm 135 · 110 Tórshavn*
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.: fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið: Ella 316261, Tone 261165, Hans Jákup 778170, Guðrið 314607. Arni 222552

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

## V4-dráttur
### í drátti nr. 1572
### 22. januar 2005

**Tølini:** 0 - 4 - 10 - 16 20 - 31 - 40 - 43 - 48 60 - 61 - 84 - 85 - 88 95 - 96

**Tríggir vinnarar**
Snars. nr. 2954417, Skopun
Snars. nr. 2981615, Saltangará
Vanl. seðil nr. 400074, Toftir

**Eykavinningar**
**Apex ferðaseðil**
Snars. nr. 2891722, Saltangará
**4.000 kr.**
Snars. nr. 2936716, Shellstøðin í Gøtudali
Snars. nr. 2980359, FK í Hoyvík

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## Brúdleyp
Leygardagin 26. februar kl. 10.00 giftast í Rituvíkar kirkju Hanna Olsen, Rituvík og Ásmundur Hansen, Søldarfjørður. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 16.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið, verða biðin um at ringja á tlf. 442036, 254250, 504970 ella 441396, 447774. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 5. mars kl. 16.00 giftast í Hvalbiar kirkju, Bettina Cjouanita Tummasardóttir Hentze úr Skopun og Dávur Holm úr Hvalba. Veitslan verður hildin í Roynhøllini í Hvalba frá kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið á teirra stóra degi, verða vinarliga biðin um at tekna seg á tlf. 260440, ella aftaná kl. 18.30 á tlf. 375036 áðrenn 10. februar.

## Silvurbrúdleyp
Mikudagin 9. februar hava Karl og Anna Sofía Vidtfeldt, Sandur, verið gift í 25 ár. Veitslan verður hildin í Ungmannafelagshúsinum Samljóð í Skopun 19. februar 2005 kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma í veitslu, verða biðin um at siga frá á tlf. 211584, 361584 ella 224946 áðrenn 3. februar 2005.

1. mars hava Emma og Daniel Johan Lisberg, Sumba, silvurbrúdleyp. Í tí sambandi verður vælkomst í Samkomuhúsinum í Sumba 26. februar frá kl. 12.00-18.00. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 10. februar á tlf. 370782.

## Gullbrúdleyp
Leygardagin 29. januar kunnu hjúnini Amanda og Leivur Andreasen í Klaksvík halda gullbrúdleyp. Vælkomst verður í Bøgøtu 3 frá kl. 17.00.

## 75ár
Mánadagin 24. januar fylti Kjartan Stakksund Eiði, 75 ár. Føðingardagurin verður hildin í missiónshúsinum Karmel fríggjadagin 28. januar kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.